DAGSINS MEINING

Afturgongdsorsøkir

Seinasta veljarakanningin hevur givið nógv at hugsa um, ikki minst hjá samgonguni. Serliga Tjóðveldisflokkurin hevur havt stóra afturgongd í mun til valúrslitið. Lat okkum undirstrika alt fyri eitt, at hetta bara er ein veljarakanning, og tí skal hon takast við størsta fyrivarni.

Í døgunum eftir veljarakanningina hevur nógv verið fokuserað uppá fullveldismálið sum orsøk til afturgongdina hjá Tjóðveldisflokkinum,. Eingin ivi er í, at fullveldismálið, soleiðis sum tað varð lanserað av Tjóðveldisflokkinum, er fallið til jarðar aftur, og at vit nú tosa um yvirtøkuferð, heldur enn nakað annað tey næstu nógvu árini, men er hetta øll orsøkin til afturgongdina hjá Tjóðveldisflokkinum?

Kann tað ikki hugsast, at framferðin hjá floksleiðsluni og tey val, hendan hevur gjørt seinastu árini eisini eru orsøk til størstu ónogdina?

Vit hava verið vitni til nøkur sera løgin mál í hesum valskeiðnum. Landsantikvarmálið var illa handfarið av táverandi landsstýriskvinnu fyri Tjóðveldsiflokkin og floksformaðurin tók sjálvur undir við hesi óhepnu handfaring. Hevur hetta ikki kostað atkvøður ella formansundirtøku? Stór ónøgd er millum fólkaskúlalærarar viðvíkjandi ársverksskipanini, ið varð koyrd ígjøgnum av formanni Tjóðveldisfloksins. Hevur hetta ikki kostað undirtøku?

Tey landstýrisfólk, ið floksleiðsla Tjóðveldsifloksins hevur valt, hava ikki havt hepna hond í øllum málum. Málið um landsantikvarin er sum nevnt eitt av óhepnu dømunum, men hvussu er við deildarleiðarnum hjá Heimarøktini, ið søgdu upp í ósemju við landsstýrismann hjá Tjóðveldsiflokkinum? Man hetta ikki eisini hava kostað undirtøku?

Hvussu við valið av samgongufeløgum? Man tað verða óbetingað undirtøka millum tjóðveldisveljarar við tey val, ið floksleiðslan gjørdi eftir seinasta val? Leiðsla Tjóðveldisfloksins valdi eftir seinasta val at fara í samgongu við Miðflokkin. Hesin lítli flokkur við líka nógvum landsstýrisfólki, sum løgtingslimum setur dagsskránna í nógvum málum. Kann ikki hugsast, at nógvir tjóðveldisveljarar vísa sína ónøgd við, at Miðflokkurin setir dagsskránna til dømis í abortmálinum. Tjóðveldisflokkurin og veljarar floksins plagdu at hoyra til tann meira progressiva veingin í føroyskum politikki. Miðflokkurin er ikki tað mest foreiniliga við hesa progressivu linju. Er tað hetta, sum stendur fyri einum parti av afturgongdini?

Afturgongdin hjá Tjóðveldisflokkinum skal kanska als ikki finnast í fullveldismálinum tá samanumkemur, men heldur í stórt sæð øllum øðrum. Vónandi er hetta nakað, ið floksleiðsla Tjóðveldisfloksins fer at hugsa um, og at hon so handlar hareftir, so vit aftur fáa eina politiska dagsskrá, ið fokuserar uppá menning og varðveitslu av modernaða norðurlendska vælferðarsamfelagnum sjálvsagt saman við einum náttúrligum men tó miðvísum sjálvstýrisútviklingi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Meiri innihald í føroyskar fjølmiðlar

Vespuprik
Uni Arge

Hetta var sokallaða prikið, sum Uni Arge, journalistur, bar fram í útvarpssendingini Vespuni fríggjakvøldið 7. november. Fleiri lesarar hava heitt á blaðið um at seta hugleiðingarnar há Una Arge í blaðið og gera vit tað við loyvi frá høvundanum. Vónandi kann hetta vera eitt gott íkast til orðaskiftið um fjølmiðlarnar í Føroyum.

Eg kundi hugsað mær at fingið meira at vita! Eg vil hava vitaminríka andliga føði frá føroyskum fjølmiðlum, men vit fáa bara skjótt gloymd perspektivleys tíðindapettir um uppblástar politiskar og umsitingarligar konfliktir, sum bara ørkymla. Eg vil hava meira at vita! Men vit fáa mestsum bara tónleik, hugnalig prát í tímavís um veður og vind, meira tónleik og undirhald. Av øllum tí tilfari, sum føroyskar útvarpsstøðir senda, eru meira enn *80 prosent* tónleikur, prát og endursendingar! Burtursæð frá nøkrum fáum glottum er ein stórur partur av restini rópandi yvirskriftir um Pop Stars, ónøgd, kreppur og so útlendsk krígstelegramm. Eg kundi hugsað mær *innlit!*

Eg vil hava perspektiverandi, frágreiðandi, upplýsandi, útgreinandi, journalistiskar *sendingar*, sum vit fáa frá útlendskum fjølmiðlum. Eg vil hava samfelagsins, lívsins og heimsins fløktu samanhangir lýstar og viðgjørdar í fyndugum framløgum og konseptum í bæði útvarpi og sjónvarpi, so vit kunnu hvessa okkum vitið og ríka okkum sálina! Vit mugu fáa tilvitandi føroyskan journalistikk og journalistar, sum kanna, fortelja og gera vitugar samrøður. Eg kundi hugsað mær sendingar um búskap, um skaldskap og um lærdóm. Eg kundi hugsað mær sendingar um miðlar, heilsu og okkara vinnulív. Hvat við sendingum um søgu, sosialmál og heimsins lond? Eg vil hava sendingar um stjórnmál, náttúru, brúkaramál, ferðslu, moral og fólkalív. Eg vil hava føroyskar dokumentarsendingar, reportasjur, sendirøðir og portrettsendingar, tí *tað* er public service!

Men vit eru í alt ov stóran mun undrandi áskoðarar til eitt politiskt slagsmál uppi á einum víðopnum fjølmiðla*palli,* har spyrjarar ongantíð finna inn til kjarnan í málinum, men altíð lata politikarar definera veruleikan úr hvør sínum smala flokspolitiska sjónarhorni. Hvør verður klókari av tí? Hvør verður klókari av øllum hesum óviðgjørdu politisku monologunum í miðlunum? Eg skilji ikki, hví føroyskir fjølmiðlar ongan *útbúgvingarpolitikk* hava, og hví teir ikki fáa fólk við dokumenteraðum *førleikum* til at geva journalistikkinum ta tyngd og ta *virðing*, sum hann trongir til at fáa. Hví verða fjølmiðlafólk heldur ikki *eftirútbúgvin*? Eg kalli á allar fjølmiðlaleiðslur, serliga tær almennu, um at hyggja upp úr teknokratisku systemunum og *forklára*, hví journalistiska *uppfinnsemið* og fakliga *viðlíkahaldið* ikki verða hildin í hevd, og hví vit fáa so lítið at vita!

Journalistiska hugflogið *má* sleppa at blóma, skulu føroyskir fjølmiðlar muna nakað mótvegis teimum *útlendsku*. Nýggj konsept, manuskript við biti í, samrøður við broddi í, spurningar, sum vilja nakað, og svar, sum vita nakað, mangla í fjølmiðlunum. Vit mugu dyrka tilvitanina og *upplýsandi* demokratisku samrøðuna! Vit mugu fáa føroyskar fjølmiðlar, sum geva *innihaldinum* og ikki *bara* undirhaldinum og dagsaktuellum retorikki rúmd, tí tá verður eisini *politikkurin* betri.

Síðan nærvørpini komu, er sendiskráin hjá okkara elstu útvarpsstøð *tambað* sundur og líkist nógv meira skránni hjá donsku *undirhalds*rásini P3 enn *upplýsingar*rásini P1. Tað mesta er lættgjørt, og lítið er viðgjørt. Er hetta *visjónin*? Okkara sjónvarp maktar nøkur *dagsaktuell* tíðindi og prát, hendinga dagsaktuellar sendingar og onkra væl gjørda sendiræð. Tað er tað. *Haldgóð vitan vantar* í miðlunum! So eg seti fram *hetta* uppskotið um, hvussu alt kann gerast *betri:*

Loftmiðlarnir skulu miðvíst fara at seta fólk at gera upplýsandi *sendingar*. Makta teir ikki sjálvir at gera allar sendingarnar, sum mangla, skulu til *dømis* fjølmiðlafólk, Fróðskaparsetrið, ílogurunnar og Mentamálaráðið fáa á føtur eitt framleiðslufelag. Ein felag, sum skal framleiða sendingar við alskyns upplýsandi og undirvísandi tilfari um heimin, lívið og *alt* okkara samfelag. Sendingarnar skulu sendast í loftmiðlunum og haraftrat brúkast í undirvísingini á *øllum* skúlum í landinum. Sum frálíður *kann* hetta samstarvið gerast spírin til eina *nýggja* føroyska journalistútbúgving á Fróðskaparsetrinum *og* eina nýggja *upplýsingar*rás, sum vit kunnu kalla Útvarp Føroya 2. Tí vit mugu hava meira at *vita*!

Er vandin í vælferðini?

... ella binda vit bara um heilan fingur viðeinum orðataki, ið liggur væl á tunguni?

TÍÐINDASKRIV
Fráhaldsráð Føroya

Leygardagin 15. november, skipar Fráhaldsráð Føroya fyri evnisdegi í Norðurlandahúsinum, um vandan við rúsevnum og misbrúki.

Evnisdagurin, har øll kunnu taka lut, byrjar kl. 10.00 og endar kl. 16.00. Umboð fyri narkoløgreglu og Bláa Kross fara at kasta ljós á faktuellu vandarnar og eisini fer ein útlendskur fyrilestrahaldari, at geva íkast til viðgerð av misbrúki.

Fráhaldsráð Føroya er eitt samstarv millum felógini IOGT, Blái Krossur Føroya, Adventistasamkoman, Haldórsvíkar Avhaldsfelag og Nólsoyar Avhaldsfelag. Fráhaldsráð Føroya er ein sannan av felags áhugamálum og at frægast er at lyfta í felag.

Hetta, at vit halda, trúgva og gita, kann koma okkara ungdómi dátt við. Og so er tað eisini - og oftast — hini, ið verða rakt av misbrúki. Evnisdagurin er ikki ætlaður sum ein felags 'grátimúrur', men hinvegin skal hann lýsa, bæði sakliga og ítøkiliga, veruleikan hjá føroyskum ungdómi.

Dagurin verður eisini karmur um úrslitið av búmerkjakappingini, ið Fráhaldsráð Føroya setti í verk fyrr í ár. Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, fer at avdúka vinnandi búmerkið og samstundis verða øll innsendu uppskotini framsýnd.

Evnisdagurin fer fram í Klingruni í Norðurlandahúsinum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Úti undir væðingini liggur ein berserkur og slotar

tórbjørn jacobsen
løgtings- & fólkatingsmaður

Røða hildin á landsfundi hjá Vinstri-Greinir

Kæru frændur ! Føroyingar eru altíð fegnir um at vera boðnir til Íslands. Kenna seg onkursvegna at vera meira í slekt við hesa tjóðina enn aðrar. Ættar- og blóðbond, mentan, mál og lívskor. Føroyskir tjóðveldismenn eru fegnir um at vera boðnir á landsfund brøðrafloksins Vinstri-Greinir. Skal nýta høvið til at bera fram kvøður frá flokkinum, frá formanni floksins Høgna Hoydal, frá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi og frá bróðurflokki okkara í Grønlandi Inuit Ataqatigiit, sum av ávísum orsøkum ongan møguleika hevði at vera umboðaður á meginfundi tykkara í dag.

Kendi russarin Alexander Solsjenitsyn segði einaferð tey vísu orðini at: "Um tjóðirnar skuldu horvið, fer hetta at gera okkum í minsta lagi líka so fátæk, sum fóru øll menniskju at verða púra eins, við sama persónleika og somu útsjónd. Tjóðirnar eru menniskjans ríkidømi, tjóðin er menniskjans kollektivi persónleiki. Sjálvt tær allarminstu hava sín serliga lit og rúma í sjálvum sær eitt serligt frábrigdi í tí guddómliga stavnhaldinum."

Á einum fundi í Keypmannahavn fyri 5 árum síðani var fyrrverandi íslendski forsetin, Vígdis Finnbogadóttir spurd, um ein so lítil tjóð sum Føroyar hevði nakran møguleika at virka sum sjálvstøðugur statur í heimssamfelagnum. Hon svaraði ógvuliga greitt og skilagott: Tað finnast ongar stórar og heldur ongar smáar tjóðir. Tað finnast bara tjóðir. Hetta er ein spurningur um kvalitet og ikki ein spurningur um kvantitet.

Fyri skjótt seksti árum síðani gjørdu íslendingar eitt eksistensielt og politiskt landnám. Republikkin var veruleiki. Tjóðskaparrørslan hevði vunnið upp ein politiskan fulnað. Skeytið uppá matrikkulin Ísland var endaliga flutt úr Keypmannahavn til Reykjavíkar. Føroyingar ætlaðu at ganga somu leið. Á fólkaatkvøðu 14. september 1946 valdi fólkið loysing, men imperialistarnir inni á meginlandinum høvdu ongar ætlanir um at minka meira um teirra lebensraum í norðurhøvum. Saðlað var um í donskum stjórnarstovum. Føroyar og Grønland skuldu hiðani og inn í ævinleikan bindast niður í búskaparligum høftum, soleiðis at Danmark kundi varveita sín stór- og geopolitiska týðning í heims-samfelagnum.

Strategiin eydnaðist. Gjald fyri vald. Størri partur in av føroyingum lat seg keypa í politiskari prostitutión. Tær politisku Føroyar hava síðani stríðst um hendan pseudo-meginspurningin hjá eini tjóð í meira enn hálvthundrað ár. Gera tað enn. Sosialdemokratar og djúpir afturhaldsmenn í Sambandsflokkinum øðrumegin og vintrahallir tjóðveldismenn og ultrahøgra konservativir fólkafloksmenn hinumegin. Ein vitleys politisk støða. Men soleiðis bardust føroyingar, í eini danskari peninga-kuvøsu, í hálvthundrað ár. Gera tað enn. Men vit stóðu á einum vegamóti í 1998, tá ið hin stóra kreppan var avhasað. Ein nýggjur búskaparligur møguleiki opnaðist og fyri fyrstu ferð síðani seinra heimsbardaga bar tað til at skipa eina heimastýrisstjórn við tí greiða máli, at Føroyar nú skuldu gerast ein suverenur statur. Eftir íslendska leistinum frá 1918, í fyrstu atlogu.

Sum Voltaire gamli segði á sinni: Eitt søguligt gap opnaði seg, eitt av hesum sjaldnu tá ið politiska skipanin hevur møguleikan at trýsta nakrar avgerandi broytingar ígjøgnum, sum kunna skaka gamlar og stirvnar skipanir.

Royndin miseyðnaðist. Í fyrstu syftu. Bulmikli danski staturin spenti vøddarnar. Brúkti karaktermorð og danskar skattakrónur til at ræða við, og vit mega bara ásanna, at mergurin í føroyska rygginum helt ikki. Stevið í sjálvstýrissamgonguni fór úr takt. Málið gjørdist aftur eitt parlamentariskt innanhýsismál í Føroyum. Og togann in er aftur hin sama sum hon var. Tað eyðnaðist tó at minkað donsku ríkisveitingarnar við einum tríðingi, úr 980 milliónum um ári, niður á 615 milliónir um ári, men politisku landnámini fylgdu ikki við, hóast sjálvstýrissamgongan gjørdi eina samtykt á Løgtingi um at gera enda á valdi dana í seinasta lagi í 2012.

Og hvaðar gongur so leiðin nú?

Nýggj stjórn, nýtt landsstýrið, varð aftur skipað á sumri í fjør. Samgongan varðveitti meirilutan saman við hinum kristiliga Miðflokkinum, sum framman undan hevði sitið í andstøðu. Tjóðskaparpolitiska siktið er lakari, men dagsskráin er framvegis løgtingssamtyktin frá 2001. At skipa føroyskar stovnar ístaðin fyri teir núverðandi donsku harímillum løgreglu og dómsvald og kirkju. Men róðurin er tungur. Neoliberalistarnir í Keypmannahavn, við Anders Fogh Rasmussen á odda, ið tóktust so laðaligir og frælslyntir í byrjanini, tátta nú í aftur kjaftbandið, vælvitandi um, at ein stórur partur av føroyska fólkinum og tí politisku skipanini í Føroyum gongur í ørviti dopað av donskum peningaveitingum. Tí er tjóðskaparstríðið so trupult. Ein helvt, kanska ein góð helvt, av fólkinum stuðlar dønum í teirra klasviska kolonipolitikki. Støðan er $1^1/_2$ - $^1/_2$ til danir. Og eg sigi ikki íslendingar ringar fyri um teir einki skilja av hesum øllum. Hetta er ikki til at skilja, at eitt fólk, ein tjóð, selur sína sál fyri materiu heimsins. Ein má liva í hesum ørandi tilstandinum fyri at skilja hann.

Einki rínur við danir. Teir verja bara donsku statsáhugamálini. Herstøðin í Thule og radarin á Sornfelli og støðin á Eiði eru einastu amboðini teir eiga í stórpolitiska spælinum. Vóru hesar súlurnar karvaðar undan teimum, høvdu teir sama geopolitiska týðning sum eitt nú Luxenborg og Lichtenstein, og tað man vera nakað síðani at nakar amerikanskur forseti hevur hildið tað verið neyðugt ella hevur tíma at tikið sær stundir til eitt prát við teir báðar oddvitarnar í fýrstadømunum báðum.

Yrkjarin og kommunisturin Jóanes Nielsen sigur í eini grein frá 85 at: "Sum leysingabørn hjá skiftandi donskum kongum hava føroyingar í øldir tugt molarnar, sum hini hava leivt. Bæði hvat mati og embætismonnum viðvíkur. Men úti undir væðingini í hvørji sál liggur ein berserkur og slotar. Hetta kom til sjóndar í verkføllunum í fimtiárunum. Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag var hin djarvi tjóðveldismaðurin Erlendur Patursson. Men teir, sum trúligast fylgdu honum, vóru innan av tí kongatrúgva Skálafjørðinum. Menn, ið ofta verða sagdir vera politiska afturhaldið í Føroyum, skutu tá við skørpum eftir kapitalismuni."

Føroyingar eru lagdir undir danskt vald og danskar kongar. Vit hava ongantíð, frá landnáminum og hiðartil dags lagt okkum undir danskt ræði, heldur ikki undir donsku grundlógina, síðani hon var veruleiki í 1849. Í dag brúka koloniharrarnir suðuri við Oyrasund donsku grundlógina sum jarnbrot móti føroyskum áhugamálum. Kirkjan skal ikki kunna flytast á føroyskar hendur uttan so at hon liggur fyri akker og íla í donsku grundlógini, sama verður skilið ivaleyst við løgreglu og dómsvaldi. Og tey flestu okkara minnast helst aftur á seinasta norðurlandaráðsfundin har danir nýttu donsku grundlógina sum amboð og jarnbrot fyri at forða føroyingum sjálvstøðugan limaskap í norðurlendsku familjuni. Eisini hitt almenna Ísland hokna-aði undan danska trýstinum. Trivnaðurin er sjálvandi stórri í klubbanum av statum, enn tað, at velja leiklutin sum enfant terrible, sum tongforloysari hjá einum hjálandi, einum politiskum leysingabarni, í grannalagnum. Tí er tað Vinstri-Greinum, og serliga formanni floksins, Steingrími Sigfussyni, til miklan heiður, at hann ongantíð hevur dult fyri sínum treytaleysa stuðli til sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og til sjálvstýrisstríðið í Føroyum. Vit báðir Høgni hava onkuntíð í skemti tosa um at fáa Steingrim balsameraðan, eftir at hann er farin út á tær ævigu jaktmarkirnar, og smíða honum eitt mausoleum á Vaglinum í Tórshavn, sum varðtekin um dyggan og treystan stuðul undir komandi føroysku republikkini.

Íslendingar er tilticknir og kendir um allan heim fyri sítt dirvið. Eisini sítt politiska dirvið. Hava verið í toskastríði við heimsveldið fyri sunnan. Vóru m.a. fyrstir at viðurkenna Ísrael og Baltalondini sum sjálvstøðug ríki. Og stríðið hjá Steingrími ber nú frugt í øðrum flokkum í Íslandi. Ungdómar og lokalfeløg hjá sjálvstaðismonnum eru nú farin at kvaklast og stuðla føroyska stríðnum, at sleppa út úr donsku kuvøsuni og inn í heimssamfelagið. Ein sjálvsøgd leið, sum stríð hevur staðið um í hálvtannað hundrað ár.

Vit fegnast um allan stuðul uttansyndis. Men føroyingurin má sjálvur loysa seg úr sínum høftum. Og vit ganga frameftir, hóast tað fyri bræsnar menn og kvinnur kann tykjast sum ferðin er alt ov lítil. Fyri okkum sum helst vildu skipa republikkina ídag, kann tað onkuntíð tykjast møtimikið, øll hendan parlamenteranin og lítið viðkomandi tosið, um at fylgja premissunum hjá valdsharrunum í Keypmannahavn. Sum frælsisstríðsmaðurin Mikis Theodorakis, ein av teimum ið stríddist ímóti fascistunum í Hellas, undir juntastýrinðum, segði einaferð: Frælsi fæst ikki, tað má takast. Hendan sannroyndin er galdandi fyri okkum á sama hátt sum fyri kúgaða fólkaræði í Grikkalandi tá ið Papadopulos var uppi á døgum.

Ein føroysk grundlóg er ávegis. Verður liðug smíðað áðrenn eitt ár er umliðið. Dómsvald, løgregla og kirkja skula skipast sum føroyskir stovnar í hesum valskeiðnum. Hendir tað ikki, tá rotast samgongan ímillum sjálvstýrisflokkarnar upp, og tjóðveldisflokkurin ætlar sær ikki longur at sita veðurfastur á donsku karusellunum. Er parlamentariska skipanin í landinum ikki nóg sterk til at loysa tjóðskapar-spurningin, tá má stríðið herðast á øðrum hermótum. Fólkið má mobilisera seg, leggja trýst á stirvnu zombiarnar á tingi, soleiðis sum vit sóu tað henda tá ið tað eyðnaðist føroyingum at sleppa undan føroyskum limaskapi í europeiska samveldinum, sjálvt um "móðirlandi" valdi eina aðra leið.

Tjóðveldisflokkurin er fyrireikaður politiskt at stjórna komandi republikkini. Hava greið mál og kláran setning um hvussu samfelagið skal skipast. Eitt trygt alment verk, ið tryggjar øllum javnbjóðis rættindi og møguleikar á almanna, heilsu, undirvísingar, mentanar og øðrum økjum, líkamikið hvussu sosiala stoðan er, líkamikið hvussu figgjarligu lunnindini eru hjá hvørjum einstøkum, er aðalmálið. Vinnan skal virka undir skipaðum marknaðartreytum. Á burðardyggum grundstøði. Eitt úrslit av góðum tjóðveldispolitikki hesi seinastu árini er m.a. at privata spekulatiónin í almennum køssum er burtur. Tey árini tá ið reiðarar og handilsmenn høvdu frítt at fara í landsins kassa spolaðu millum 13 og 14 milliardir danskar krónur út úr felagskassanum bara á hesari kontuni. Serliga hendan atgerð okkara hevur gjørt búskapin so mikið sjálvberandi, at økonomiska argumentið fyri politiska sambandinum millum Keypmannahavn og Tórshavn at kalla er burtur.

Í duginum at fáa javnvág ímillum lýtini og skyldurnar liggur tann veruligi statsmanskunsturin. Og Arthur M. Schlesinger, jr., ráðgevi hjá Kennedy forseta legði afturat: Hvussu er okkara støða mótvegis Vietnam í so máta?

So dystin lærdir teir annars eru í stjórnarkynstri, so er danski kolonipolitikkurin ikki so frætt nýanseraður, at danski forsætisráðharri kundi funnið uppá at spurt seg sjálvan hendan spurningin. Sohvørt sum fingrarnir fáa takholt á rimini verður jarnhælurin traðkaður í. Har er eingin náði. Tilboðið er meira búskaparligt kraftfóður fyri framhaldandi danskt vald. Eitt sløð av olmussu ballað inn í eitt slag av siviliseraðum solidariteti. Teir rópa seg eisini uppá javnrættindi millum sokallaðu ríkispartarnar Grønland, Føroyar og Danmark. Javnstøða sum veruligur aktørur í heimssamfelagnum verður ikki úrslitið av hesum pseudopolitikki. Komi at hugsa um Amilcar Cabral. Oddviti í frælsisrørsluni í Guinea-Bissaus. Portugisiskir agentar skutu hann hin 20. januar 1973. Stutt fyri lívlátið segði hann hesi skilagóðu orðini á einum landsfundi hjá svenska javnaðarflokkinum: "Samhaldsfesti og eingin javnstøða er bara ein olmussa, og olmussir hava ongantíð stuðla undir nakran framburð, hvørki hjá eini tjóð ella menniskjum annars. Og trygd við ongari javnstøðu er tað sama sum autoritert patriarkat, verja ella beinleiðis kolonialisma. Hon stendur altíð í andsøgn til veruliga frælsi hjá tjóðum og menniskjum." Misskilta danska samhaldsfestið, sum føroyska íhaldið tosar um, er tí ikki annað enn torvmold, sum sjálvstýrissamgongan í Føroyum eigur at lempa burtur, um hon annars hevur styril til tess.

Kæru frændur. Fegin um at hitta tykkum. At kenna hitan úr lógvum sum vilja lyfta saman við okkum í strembanini fram ímóti einum so sjálvsøgdum málið sum javnrættur er. Javnrættur ímillum manna líkaso væl sum millum tjóða. Okkara uppgáva er at verja individi og samfelagið móti atsøknum bæði innan- og uttaneftir. Og at brynja og styrkja um samfelagið soleiðis at framtíðin er ein avbjóðing og ein møguleiki heldur enn ein hóttan fyri okkara eftirkomarar.

Sum Jens Pauli Heinesen endar stóru skaldsøgu sína, Frænir eitur ormurin: "Alt er relativt, alt er komplementert. Stundin er komin til nýtt siðaskifti, ein nýggjan kopernikuslátur. Rekið menniskjað út úr skýmaskotinum. Setið meg omanfyri náttúrulógirnar og latið tarvin liggja á biti við mína lið.

Kæru frændur. Enn einaferð tøkk fyri at vit vóru boðnir við á landsfund tykkara, og bestu kvøður frá vinaflokkum tykkara í Grønlandi og Føroyum.